# VEÐRIÐ




**Veðrið í dag**
Turrveður við nakað av sól og hita millum 8 og 12 stig, 3 til 8 m/s av útsynningi, sum seinni snarar í ein landsynning. Í kvøld og í nátt verður skýggjað og tað fer at regna av útsynningi. Vindferðin økist, í støðum upp í 8 til 15 m/s. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin**
Eystanvindur, 10 til 15 m/s, sum spakuliga snarar suðurum. Skýggjað veður við regni, seinni klárar hann í við æla-veðri. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið mánadagin**
Sunnanvindur, 8 til 13 m/s, sum snarar í ein landsynning og minkar niður í 5 til 10 m/s. Ælaveður og skýggjað, men av og á við sólarglottum. Hitin millum 7 og 12 stig.

# Ovurhonds stórur áhugi fyri summararbeiði

**Okkurt um 60 ungdómar í Havn skrivaði seg fríggjamorgunin upp til summararbeiði, ið kommunan hevur til ungdómar í býnum**

SUMMARARBEIÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tórshavnar Kommuna lýsti í bløðunum hóskvøldið við, at kommunan hevði hækkað játtanina til summararbeiði til skúlaungdómar, og at tískil var møguleiki hjá fleiri ungum at skriva seg upp til eitt slíkt arbeiði í Snarskivuni fríggjamorgunin.



*Bíðirøðin var long, tá ið ungdómar fríggjamorgunin høvdu møguleika fyri at skriva seg upp til eitt summararbeiði hjá Tórshavnar Kommunu.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Long bíðirøð

At áhugin var stórur fyri hesum, sást aftur, tá ið starvsfólkini hjá kommununi komu til arbeiðis fríggjamorgunin, tí tá stóð longu ein long bíðirøð uttan fyri Snarskivuna og vildi skrivast upp til eitt summararbeiði.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at býráðssamgongan valdi at hækka játtanina úr 200.000 krónum upp í 500.000 krónur, so at fleiri ungdómar kundu fáa møguleikan at vinna sær eitt sindur av peningi í summar. Áðrenn broytingin í játtanini var framd, høvdu 20 ungdómar fingið arbeiði í ein mánað, men býráðið hevur nú valt at hesi bert skulu arbeiða í tvær, soleiðis at tað verða fleiri, ið kunnu sleppa til arbeiðis, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur seg harmast, at neyðugt er at minka um arbeiðstíðina hjá teimum 20 ungdómunum, men hinvegin fegnast hann um, at tað verða fleiri, ið fáa okkurt at fara upp til um morgunin í summarfrítíðini, og summi kunnu vinna sær eitt sindur av peningi.

LIMOUSINE KOYRING Í FØROYUM



9 pers. bilur við leðursetrum og sjónvarpi



· Brúðarkoyring
· Polter-abend koyring
· Dagtúrar
· VIP-túrar

limo.fo
limo@limo.fo
tel 21 97 97

Sosialurin 341800




## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 37 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ






Eitt hátrýst yvir Norðurskandinavien flytir seg ikki, og lýggj og slævin luft rekur móti Føroyum úr landsynningi. Eitt lágtrýstøki millum landsynningspartin av Grønlandi og Íslandi ferðast ikki, og tilhoyrandi brúgvaløg fóru í gjár fram við oyggjunum, fylgdar av køldum ráki úr útsynningi. Seinnapartin í dag fer eitt lágtrýst fram við Írlandi og rekur norðureftir, og fer í morgin fram við Føroyum vestanfyri. Mánadagin og týsdagin fer lágtrýstið at liggja yvir Íslandi, har tað so líðandi grynnist

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/6 kl. 06⁰⁰– 1/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 30/6 kl. 06⁰⁰– 1/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 72,4 mm

## ÚF Morgunlestrar
**20. - 25. juni**

***Jóannes Johannesen í Dali, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 4. juli:**
nr. 39 Tað, Guð mín vil, tað komi á
nr. 41 O, faðir, goym meg við tín favn

**Týsdagin 5. juli:**
nr. 27 Ævigi Guð vár, títt veldi, tín æra

**Mikudagin 6. juli:**
nr. 521 Hvør føgur skal Guðs kirkja stá

**Hósdagin 7. juli:**
nr. 341 Kom, latum okkum fara
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

**Fríggjadagin 8. juli:**
nr. 305 Leið meg, Guð, á lívsins veg
nr. 279 Harri, kom í lív mítt inn

**Leygardagin 9. juli:**
nr. 62 Tú, Harri Krist

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 23. juni | Mánin næstur jørðini |
| 28. juni | Seinna kvarter |
| 5. juli | Jørðin longst frá sólini |
| 6. juli | Tendring |
| 8. juli | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. Juli | 04.18 | 16.41 | 03.18 | 15.41 | 03.33 | 15.56 | 06.18 | 18.41 | 07.18 | 19.41 | 02.33 | 14.56 | 01.33 | 13.56 | 04.33 | 16.56 | 05.33 | 17.56 | 04.03 | 16.26 | 05.18 | 17.41 |
| 3. Juli | 05.04 | 17.28 | 04.04 | 16.28 | 04.19 | 16.43 | 07.04 | 19.28 | 08.04 | 20.28 | 03.19 | 15.43 | 02.19 | 14.43 | 05.19 | 17.43 | 06.19 | 18.43 | 04.49 | 17.13 | 06.04 | 18.28 |
| 4. Juli | 05.52 | 18.17 | 04.52 | 17.17 | 05.07 | 17.32 | 07.52 | 20.17 | 08.52 | 21.17 | 04.07 | 16.32 | 03.07 | 15.32 | 06.07 | 18.32 | 07.07 | 19.32 | 05.37 | 18.02 | 06.52 | 19.17 |
| 5. Juli | 06.41 | 19.06 | 05.41 | 18.06 | 05.56 | 18.21 | 08.41 | 21.06 | 09.41 | 22.06 | 04.56 | 17.21 | 03.56 | 16.21 | 06.56 | 19.21 | 07.56 | 20.21 | 06.26 | 18.51 | 07.41 | 20.06 |
| 6. Juli | 07.31 | 19.56 | 06.31 | 18.56 | 06.46 | 19.11 | 09.31 | 21.56 | 10.31 | 22.56 | 05.46 | 18.11 | 04.46 | 17.11 | 07.46 | 20.11 | 08.46 | 21.11 | 07.16 | 19.41 | 08.31 | 20.56 |

5 707265 100067 >